## Kaj afturí Gøtu

30. desember skrivaði Kaj Ennigarð undir sáttmála við GÍ/LÍF. Kaj spældi baraárini og fram til í fjør við GÍ, men seinasta kappingarár var hann partur av liðnum hjá KÍ. - Hetta er sjálvandi at fegnast um hjá okkum. Sjálvandi royna feløg altíð at styrkja sær um hópin, men fyrst og fremst hevur tað týdning, at vit kunnu halda upp á okkara egna fólk. Og nú er so greitt, at vit hava fingið Kaj aftur í hópin, og tað er ein veldugur styrkur hjá okkum, sigur Andreas Poulsen, formaður hjá GÍ.



## Stórt undirskot í AaB

Hóast tað ítróttarliga hevur gingið strálandi hjá AaB, har teir halda nýggjár fremst í Superliguni og hava leikt í UEFA Cup-bólkaspælinum, hevur tað gingið verri við tí fíggjarliga. Felagið væntast at koma út við einum undirskoti á heilar sjey milliónir krónur fyri árið 2007. Grundgevingin sigur nevndin vera tann, at felagið ikki hevur fingið selt nakrar nýmótans bygningar, sum roynt hevur verið at selt. Felagið væntar ístaðin, at hesar inntøkur koma í roknskapin fyri komandi ár.

## Rúni Weihe til ÍF

**ÍF-flogbóltur fær munandi styrk, nú Rúni Weihe kemur aftur til Fuglafjarðar**

FLOGBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Hetta boðar ÍF frá á heimasíðu felagsins. Rúni Weihe hevur seinastu fýra árini verið ein av profilunum hjá norska BK Tromsø, men skiftir nú tilveruna í tí norska út við flogbólt í Fuglafirði. Har hevur Rúni Weihe spælt áður, tá hann í 2002-2003 var við at við greipuna við ÍF. ÍF vónar við hesum, at tey fara at megna at endurtaka bragdið.



*Rúni Weihe aftur í hvíta og reyða búnanum*
*Mynd: www.if.fo*

# Brasilsk loysn í Sarpugerði

**Sum seinasta Formula-liðið heuvr GÍ/LÍF sett venjara. Hesin er brasilumaður og er eisini fyrrverandi landsliðsvenjari**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Meðan allir kappingarneytarnir í Formula-deildini hava valt eina føroyska loysn, verður tað nakað so forkunnugt sum ein brasilskur venjari, ið skal standa á odda fyri GÍ/LÍF komandi kappingarárið.

Maðurin eitur Dito, og er 46 ára gaml. Hann hevur drúgvar royndir í hollendskum og ísraelskum fótbólti, og eitt skifti var eisini landsliðsvenjari hjá Vietnam. Her fekk hann tó sekkin, tá tað ikki eydnaðist at røkka ambitiøsa málinum um HM-luttøku.



### Positiv skoðsmál

- Tað hevur drigið út hjá okkum at finna venjara. Vit hava verið í samband við nógv nøvn, og onkra tíð hildu vit okkum hava fingið alt undir land, uttan at hetta tó eydnaðist, sigur Andreas Poulsen, formaður í GÍ/LÍF.

Hann leggur tó dent á, at talan kortini ikki er um nakra panikk-loysn.

- Vit halda okkum hava kannað málið væl og virðiliga, áðrenn venjarin er settur. Tað ljóðar kanska nakað vágið, nú vit eru fyrsta felagið, ið setir ein brasilumann í venjarasessin. Men allar tær upplýsingar, sum vit hava fingið um nýggja venjaran, peikað einvíst rættа vegin. Og vit hava fyrr víst, at vit ikki eru bangin um at royna nýggjar leiðir.

Tað er í samstarvi við Ólav Waag Høgnesen, umboðsmann, at samand er fingið við nýggja venjaran. Ætlandi kemur til Føroya um 10. januar.

*Tað verður ein brasiliumaður, ið skal leiða samansetta GÍ/LÍF*

## HB leingir við Poul og Pætur

Nýggjársaftan skrivaði HB nýggjan sáttmála við Pætur Dam Jørgensen og Poul Thomas Dam.

Báðir hava teir sína uppaling í felagnum, og í fjør var Poul Thomas fastur partur av Formula-hópinum hjá felagnum. Pætur var eisini eitt skifti partur av Formula-hópinum, men seinnu kappingarhálvu royndi hann seg hjá AB. Báðir eru teir eisini partur av føroyska U21-landsliðnum.

**-mørk**

# UEFA vil hava hjartakanningar

**Leygardagin skakaði enn eitt deyðsfall fótbóltsheimin. Hetta tá liðskiparin hjá skotska Motherwell, Phil O'Donnell, small um í dysti móti Dundee United**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

35 ára gamli O'Donell hevur eina drúgva fortíð í skotskum fótbólti. Í drúgt áramál spældi hann við Celtic, og í Motherwell varð hann roknaður sum ein av berandi kreftunum. Leygardagin var hann á veg av vøllinum, tá hann fall í óvit, og komin á sjúkrahúsið varð staðfest, at hann var deyður.

### Krevja hjartakanning

Læknin hjá Motherwell kundi seinni staðfesta, at orsøkin til deyðan var, at O'Donell hevði eitt álvarsamt hjartabrek, og tað hevur aftur fingið UEFA at taka avgerð um, at hjartakanning nú verður kravd fyri yrkisspælarar.

- Hendingin í Skotlandi vísir enn einaferð á tørvin fyri at kanna yrkisspælarar. Tú kanst ikki við vissu finna fram til allar hjartasjúkur hjá spælarunum. Men tú kanst finna nøkur dømi um hetta, og so hevur tú gjørt tað, sum er gjørligt at gera, sigur Jan Kyst Madsen við danska bold.dk. Jan Kyst Madsen er yvirlækni á sjúkrahúsinum í Gentofte og er limur í medisinsku nevndini hjá DBU.

*Enn eitt deyðsfall skakaði leygardagin allan fótbóltsheimin. Liðskiparin hjá Motherwell, Phil O'Donnell, var ávegis av vøllinum, tá hann small um*
*Mynd: Polfoto/AP*

